Fylgiskjal 14

Guðrið Dam Andreasen

Fra: Katrin Thorsvig Hansen
Sendt: 17. september 2020 09:15
Til: Katrin Thorsvig Hansen
Emne: VS: løgtingslógaruppskot um yvirvøku við vakmyndatóli

Fra: Jógvan Høgnesen <jh@trygdartokni.fo>
Sendt: 16. september 2020 09:04
Til: Katrin Thorsvig Hansen <katrinth@tinganes.fo>
Emne: Re: løgtingslógaruppskot um yvirvøku við vakmyndatóli

Góða Katrin

Orsaka seint aftursvar.

Til spurningin um kamera-attrappir ella sokallaði dummy kamera, hava hesi verið á marknaðinum alt tað eg kenni til. Tað eru ikki nógv av hesum at síggja í Føroyum. Tey vóru kanska meir brúkt fyrr, av tí at kameraútgerðin tá var so kostnaðarmikil.

Eg havi gjøgnumgingið uppskotið enn einaferð og havi bert ein spurning, hann er um leikluturin hjá Dátueftirlitinum í samband við at vakmyndatól skula fráboðast.

Tað at øll vakmyndatól skula fráboðast og koma í eina skrá var eitt ynski og meti eg at tað kemur at hava stórt gagn fyri Politiið og samfelagið í samband við skjótari og betri uppkláring.

Komandi lógin sigur at.:

"Í stk. 2 verður lagt upp til, at tann, sum setur vakmyndatól o.a. upp, skal boða Dátueftirlitinum frá hesum, og at Dátueftirlitið førir eina skrá yvir hesi tól.
Orsøkin til hesa áseting er fyri tað fyrsta at halda eyga við gongdini á yvirvøkuøkinum, og at tryggja vanligt skilhald á økinum. Yvirvøka við vakmyndatóli kann vera eitt inntriv í frælsi hjá tí einstaka, og tí er neyðugt at halda eyga við gongdini á økinum, eins og ein fráboðanarskylda kann hava við sær avmarking í nýtslu. Fyri tað næsta skal ein skrá tryggja, at tað er møguligt hjá politiinum skjótt at kanna, um vakmyndatól eru í einum øki, sum er viðkomandi fyri kanning av einum ítøkiligum máli.
Talan er um eina fráboðanarskipan og ikki um eina loyvisskipan. Dátueftirlitið skal tí ikki geva loyvi til uppseting av vakmyndatólum. Dátueftirlitið kann tó vegleiða um hesa løgtingslóg og dáturættarligu avbjóðingarnar við yvirvaking o.s.fr. Um eitt fráboðað vakmyndatól greitt er í stríð við hesa løgtingslóg, skal Dátueftirlitið sjálvandi eisini gera vart við hetta. At talan ikki er um eina loyvisskipan er í samsvari við skipanina á dátuverndarøkinum, har sum man við nýggju dátuverndarlógini fer burtur frá, at loyvi skal gevast til viðgerð frammanundan.
Upplýsingar skulu latast Dátueftirlitinum, so tað er púra greitt, hvar vakmyndatóli er sett upp og hvat upptøkan fevnir um."

Hvussu kann hetta gerast í praksis? Er tað nøktandi um dátuábyrgarin ringir, sendir bræv ella ein teldupost til dátueftirlitið og sigur hvar vakmyndatólið stendur og hvat tað vísur?

Soleiðis sum mannagongdin hjá Dátueftirlitinum hevur verið, hava tey biði um eina skermmynd frá vakmyndatólinum til at taka støðu út frá, sjálvt um man í verandi fráboðarnarblað hevur skula upplýst hvar

vakmyndatólið skal standa og hvat tað kemur at vísa áðrenn loyvi fyriliggur. Við tað at tey hava kravt eina skermmynd at taka støðu út frá, hava vit (installatørar) uppsett vakmyndatólini upp hjá kundunum fyri kundin síðan kann senda Dátueftirlitinum eina fráboðan saman við skermmyndunum. Í fleiri førum hava tey kravt broytingar, tvs. at vakmyndatól muga snarast, flytast ella maska leggjast á myndina, soleiðis at tey 'lúka' dátuverndarlógina, sjálvt um vit hava havt eina aðra áskoðan og meta tey vera uppsett eftir galdandi reglum. Tað hevur eisini verið sera skiftandi við hvat hevur verið 'loyvið' og ikki, alt eftir hvør málsviðgerin av umsóknini hevur verið.

Vinarliga heilsan / Kind regards

Jógvan Høgnesen
Stjóri / CEO

TRYGDARTØKNI

Phone: +298 550055
E-Mail: jh@trygdartokni.fo
Web: www.trygdartokni.fo

The information contained in this message may be CONFIDENTIAL and is intended for the addressee only. Any unauthorised use, dissemination of the information or copying of this message is prohibited. If you are not the addressee, please notify the sender immediately by return e-mail and delete this message.

LM-044/2020